LM-011/2025

Fylgiskjal 6.

FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

Løgmálaráðið
Gongin 7
Postrúm 377
FO-110 Tórshavn

Staður: Tórshavn
Dagfesting: 08.08.2025
Ummælistíð: 01.07.2025-08.08.2025
J. nr. (MEGD): 701-2-2025
J. nr. (LMR): 24/26438-19

Hoyringarskriv

til *uppskot til løgtingslóg um sterilisatión og kastratión (Sterilisatiónslógina)*

MEGD takkar fyri møguleikan at ummæla uppskotið og fyri undanhoyring hjá Løgmálaráðnum fyrst í apríl mánað um hetta týðandi evnið.

Samanumtøka

Við fylgjandi grundgevingum vil MEGD mæla Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið í verandi líki. Myndugleikar hava skyldu at tryggja hóskandi átøk og tænastur, ið *stuðla* fólki, ið bera brek, at taka avgerðir, sum eru *rættar* fyri tey, og ikki fyri nakran annan. Sterilisatión er m.a. av hesi orsøk eitt serliga samansett evni fyri fólk, og serliga kvinnur, við breki. Hóast fólk við breki sambært uppskotinum fáa bjóðað stuðlandi samrøðu, kann avgerð í ávísum førum verða tikin fyri fólk við breki. Um *rætt* avgerð ikki verður tikin fyri hin einstaka, kann talan verða um tvingsil. Hetta kann merkja píning (tortur) og lívslangar avleiðingar. Tað er eisini ómetaliga álvarsamt, at uppskotið loyvir og kann tulkast til at leggja upp til *ættarrøkt* og *brek-grundaða* sterilisatión, m.a. fyri ikki at føra brek ella sjúku víðari til komandi ættarlið. Uppsktið allýsir ikki hugtøkini *brek* ella *sjúka*, men steriliseringin skal tó eftir ætlan forða fyri at børn við ávísum brekum ella sjúku verða fødd. MEGD hevur hinvegin ta greiðu fatan, at bæði vaksin og børn við breki eiga framhaldandi at varðveita somu virðing og tign, sum onnur, ið ikki bera brek, í Føroyum. Um steriliseringslógin skal *nútímansgerast*, eigur hon tí ikki at leggja upp til *mismun* og *ættarrøkt* mótvegis fólki, ið bera brek, ella børnum teirra. Í nevndu viðurskiftum stríðir uppskotið við altjóða skyldur Føroya millum annað sambært Brekrættindasáttmálanum, evropeiska mannarættindasáttmálanum, sum er galdandi sum løgtingslóg, og øðrum altjóða mannarættindasáttmálum.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

FAROESE DISABILITY ORGANIZATIONS

Neyðugt at tryggja rættarføri og hóskandi stuðul til at taka avgerðir

Føroyar hava sambært grein 12 í Brekrættindasáttmálanum[1] altjóða skyldu at tryggja, at fólk við breki eru *eins fyri lógini*. Hetta verður kallað rættarførið (á enskum *legal personhood*), og inniber m.a. rættin til at taka avgerðir um egin viðurskifti. Rættarførið skal verða viðurkent[2] á jøvnum føti við onnur og í øllum lívsins viðurskiftum,[3] og í verki skulu landsins myndugleikar taka hóskandi stig til at útvega fólkum, ið bera brek, atgongd til tann stuðul, tey kunnu hava tørv á til tess at nýta sítt rættarførið.[4]

Rættarførið hevur alstóran týdning fyri at flestøll rættindi skulu verða framd í verki á nøktandi hátt,[5] her undir grein 5 um *javnrættindi og ongan mismun*, grein 10 um *rættin til lív*, grein 15 um um *frælsi frá pining ella miskunnarleysari, ómenniskjaligari ella niðrandi viðferð ella revsing*, grein 17 um at *verja sjálvræðisrættin (integritetin) hjá tí einstaka*, grein 19 um *sjálvstøðugt lív og at vera tikin upp í samfelagið*, grein 23 um *virðing fyri heimi og húski* og grein 25 um *heilsu*.

Endamálið við uppskotinum er m.a. at *nútímansgera* galdandi steriliseringslóg, sum er frá 1967, og at tryggja fólki *lættari atgongd til sterilisatión*.[6] Uppskotið byggir á kapitul 7 í donsku *Sundhedsloven*,[7] sum er sera umfatandi og m.a. ásetur eina langa røð av viðkomandi mannagongdum, skipanum og rættindum í mun heilsutænastur, her undir mannagongdir, um avgerðir verða tiknar.[8]

Føroyska uppskotið ásetur møguleika fyri eini stuðlandi samrøðu, um fólk við breki møguliga ynskja sterilisatión, men lýsir ikki nøktandi júst hvussu hetta fer fram.[9] Nøkur týðandi ivamál standa tí ósvarað um, júst hvussu og í hvønn mun fólk, ið bera brek, sjálvi, m.a. við hóskandi stuðulstænastum, og rímiliga tillagaðum kørmum og umstøðum, kunnu taka hesa avgerð.

---

[1] Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. (Brekrættindasáttmálin). LM-162/2008. Skjal 1; Bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2009 om FN-konvention af 13. december 2006 om rettigheder for personer med handicap.

[2] Brekrættindasáttmálin, grein 12, stykki 1.

[3] Brekrættindasáttmálin, grein 12, stykki 2.

[4] Brekrættindasáttmálin, grein 12, stykki 3. Sí eisini Committee on the Rights of Persons with Disabilities. General comment No. 1 (Article 12: Equal recognition before the law). Sí stykki 1 í skjali CRPD/C/GC/1.

[5] Sama kelda sum áður.

[6] Sí brot 1.3 um *Endamálið við uppskotinum* á síðu 5.

[7] *Sundhedsloven*. LBK nr 1011 af 17/06/2023. Í Danmark er eisini ein kunngerð galdandi og ein vegleiðing.

[8] Sama kelda sum áður. Sí eitt nú kap. 5 um *Patienters medinddragelse i beslutninger*, her undir grein 20 um *Patientens inddragelse* og grein 21 um *Sundhedspersonsens ansvar*, og kap. 6 um *Selvbestemmelse i særlige tilfælde*.

[9] Sí eitt nú viðmerkingarnar til grein 6: *er tann, sum søkir um sterilisatión, ikki før fyri at skilja týdningin av inntrivinum, kann samráðið geva loyvi til sterilisatión eftir umbøn frá einum serligum verja og at í slíkum førum krevst loyvi frá samráðnum.*

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

Bæði heilsustarvsfólk, verjar, serligir verjar, umboð í samráðnum, umframt onnur almenn starvsfólk, kunnu taka skeiva avgerð *fyri* fólk, ið bera brek, ið ikki veruliga byggir á veruliga áhugan ella viljan hjá viðkomandi, ið ber brek. Talan verður tá um *tvingaða sterilisering*,[10] ið kann føra við sær sera álvarsamar og umfatandi fylgjur og líðing alt lívið fyri tann, ið verður tvingaður at fáa steriliseringsviðgerðina, og kann slík óviljað sterilisering verða sammett við píning (tortur).[11]

Tað kann bæði vera tyngjandi og revsivert fyri viðkomandi starvsfólk, um steriliseringin verður tvingað,[12] og ein skeiv avgerð kann eisini fáa rættiliga álvarsamar og umfatandi avleiðingar fyri familju og avvarðandi hjá tí, ið fær steriliseringsviðgerð.

Lógaruppskotið nevnir nakrar ferðir í viðmerkingunum, at heimild er ikki fyri at fremja inntriv við tvingsli[13] og verður kunnað samtykki eisini nevnt sum treyt, t.d.:

> *Ein avgerð um sterilisatión skal altíð byggja á kunnað samtykki, og hetta samtykki eigur ikki at verða treytað av samtykki frá øðrum ella at onnur verða kunnaði um tað, uttan so, at viðkomandi, sum inntrivið skal fremjast á, ikki sjálvur er førur fyri at skilja týdningin av inntrivinum.*[14]

Tað er ógreitt hvussu víðfevnd hendan verjan er, og hvat, ið meint verður við, tá orðið *tvingsil* verður nýtt, og í øðrum lagi kann undantak vera gjørt til kravið um kunnað samtykki, um fólk ikki skilja týdningin av inntrivinum.

Tað hevði verið greiðari, um sjálvur lógarteksturin innihelt eina áseting um, at tvingað sterilisatión ella sterilisatión uttan kunnað samtykki, eru ikki loyvd, heldur enn at hetta einans verður skrivað í viðmerkingunum. Eisini átti lógarteksturin, ella onnur viðkomandi lóggáva,[15]

---

[10] Fulla allýsingin av tvingaðari sterilisering er: *Sterilisation can be defined as a process resulting in a permanent incapacity of natural reproduction. This process is forced when a person undergoes sterilisation without their knowledge or consent or after expressly refusing it, or if the sterilisation takes place in the absence of a serious and immediate threat or risk to health and life3 . Sterilisation is also coerced when the person is compelled to accept sterilisation by their family and/or medical professionals, or when it is required by policies or legislation, for example to have access to services (e.g. residential institution) or changes in legal document (e.g. modification of gender in legal document for trans people).* Kelda: EDF Report - September 2022 Forced sterilisation of persons with disabilities in the European Union, síða 8.

[11] Sí meir kunning á s. 6.

[12] Løgtingslógarkunngerð nr. 8 frá 20. februar 2024 um revsing (Revsilógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 83 frá 2. mai 2025. Grein 94, stykki 5. Aldursmarkið á 18 ár átti at verið hækkað, um talan er um fólk við breki.

[13] Sí á s. 5, 3.reglubrot: "*Talan er um eitt tilboð, og eingin heimild er fyri at fremja inntriv, sum eru fevnd av lógini, við tvingsli*" og á s. 23,4. 1. reglubrot: "*Eingin heimild er fyri at fremja inntrivið við tvingsli.*"

[14] s. 13 í lógaruppskotinum undir 2.16; eisini á s. 8, 2. reglubrot: "(…) so leingi tey kunnu geva kunnað samtykki til tess"

[15] Tað kundi t.d. verið almannalógin ella heilsutrygdarlógin.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

at staðfest rættindini til munagóða atkomu, tillagað samskifti, hóskandi stuðulsátøk og rímiligar tillagingar í tilgongdini at taka avgerðir.

ST-nevndin (*brekættindanevndin*), ið hevur eftirlit við brekrættindasáttmálanum, hevur so nýliga sum í september 2024 eygleitt,[16] at londini í ríkisfelagsskapinum loyva sterilisatión *uttan* at fólk við breki sjálvi hava givið sítt *sjálvbodna og kunnaða samtykki* til hetta. Sum loysn mælir brekættindanevndin londunum til, her undir føroyskum myndugleikum, at endurskoða viðkomandi lógir, so at sterilisatión, uttan eitt frítt og kunnað samtykki frá einstaklinginum sjálvum, verður bannað. Tilmælið ljóðar soleiðis:

> Stykki 49. The Committee is concerned that legal and policy frameworks across the Kingdom of Denmark *allow for sterilisation*, contraception and abortion procedures on women and girls with disabilities under guardianship *without their personal consent*, including under the sections 109 and 110 of the Health Act.
>
> Stykki 50. At løgfrøðiliga og politiska grundarlagið verður broytt til tess at forða mannagongdir at sterilisera, gitnaðarforða, og geva fosturtøku til konufólk og gentur, ið bera brek, ímóti teirra upplýsta, frælsa og persónliga vilja.[17]

Ásetingarnar í donsku sundhedsloven, sum brekættindanevndin m.a. finst at – greinar 109 og 110 – tykist í høvuðsheitum at svara til greinar 5 og 6 í fyriliggjandi uppskoti til løgtingslóg, sum her letur upp fyri, at ein serligur verji – og ikki persónurin sjálvur – í serligum førum einsamallur kann søkja um sterilisatiónina, og at samráðið kann geva loyvi til inntrivið, *tá ið umstøðurnar tala fyri tí*.

Tað tykist sera ivasamt í sjálvum sær, at uppskotið á hendan hátt vil avrita danskar lógarásetingar, sum brekrættindanevndin hjá ST talaði at og mælti til at broyta fyri minni enn einum árið síðani.

Støðurnar, har spurningurin um óynskta ella ósjálvbodna sterilisatión stingur seg upp, snúgva seg m.a. um persónar, sum orsaka av menningartarni ella sálarsjúku ikki eru førir fyri at skilja týdningin av inntrivinum, og ivi er um, hvørt tey sjálvi hava sent umsóknina og ynskja inntrivið. Víst verður partin: Umsókn um sterilisatión, greinar 4-10.

Lógin leggur upp til, at í hesum førum skal viðkomandi fáa tilboð um eina stuðulssamrøðu við eina óhefta ráðgeving (starvsfólk í Almannaverkinum), sum skal stuðla *viðkomandi í at taka avgerð á upplýstum grundarlagi*.[18] Gevur viðkomandi til kennar ivasemi ella, at viðkomandi ikki

[16] https://landsstyri.cdn.fo/savn/przh431w/2-tilmaeli-fra-st-til-kongsriki-danmarkar-2024-a-enskum.pdf?s=u2ipmG3roJ4fgK6P-7LhZ1l7GVg

[17] Committee on the Rights of Persons with Disabilities (CRPD) Concluding observations on the combined second and third periodic reports of Denmark. CRPD/C/DNK/CO/2-3.

[18] Almennu viðmerkingarnar, s. 7, 3. reglubrot og serligu viðmerkingarnar til grein 9, stykki 2 reglubrot á. s. 23.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

vil steriliserast, siga tær serligu lógarviðmekingarnar, at so eigur tað í *samrøðuni at verða viðgjørt hvussu hetta kann vera boðað víðari til tann, sum umsitur áhugamálini hjá tí, sum inntrivið skal fremjast á, ella tann læknan, sum viðkomandi seinni skal tosa við og kannast av, um umsóknin um sterilisatión framvegis verður fasthildin. Hesar upplýsingar skulu leggjast fyri samráðið, sum skal taka avgerð í málinum, og hesar upplýsingar viga tungt í metingini av, um loyvi verður givið ella ikki. Eingin heimild er fyri at fremja inntrivið við tvingsli.*[19] Hóast tað er jaligt, at skipað verður fyri eini stuðlandi samrøðu, so tykist hendan loysnin tó ikki at leggja upp til, at viðkomandi skal geva kunnað samtykki til viðgerðina (sum ein verji hevur biðið um).

Samstundis kann teksturin bera brá av, at tað snýr seg um at greiða frá grundgevingum fyri inntrivinum ella at sannføra persónin um at tað er skilagott og rætt at gera. Tað er heldur ikki rætt, at umrøða stuðulssamrøðuna, sum hjálp til viðkomandi, at *taka avgerð* á upplýstum grundarlagi, tá tað í roynd og veru er samráðið, sum í hesum serligu førum hevur avgerðarrættin, og í roynd og veru kann geva loyvi til sterilisatión, hóast persónurin sjálvur ikki hevur søkt um ella ynskir tað (einki krav um persónligt kunnað samtykki). Um avgerðin hjá samráðnum ikki samsvarar við viljan hjá tí, sum sambært avgerðini fær sterilisatión, verður ein avleiðing sannlíkt at talan verður um tvingsil, annahvørt ótilætlað ella tilætlað.

Í almennu viðmerkingini frá altjóða brekrættindanevndini til grein 12 um rættarførið verður staðfest, at kvinnur, ið bera brek, við hægri týttleika verða tvingaðar til sterilisatión, og, grundað á fordómar um at tær ikki eru førar fyri at geva samtykki til samlegu, verða tær mangan nokaðar ræðið á egnum avgerðum, ið viðvíkja egnari nøring og heilsu.[20]

Altjóða brekrættindanevndin leggur serliga stóra áherðslu á týdning av fylgjandi tilmæli til føroyskar myndugleikar í nýggjastu frágreiðingini frá september 2024, nevniliga fyri at fáa ment eina góða skipan til at stuðla undir avgerðir hjá fólki, ið bera brek:[21]

> *At tillaga Verjumálslógina, so øll fólk, ið bera brek, eru tryggjað løgfrøðilig rættindi, og endurskoða øll verandi verjumál og reglugerðir um forboð og verjumál og tillaga tey til nýggju skipanina við stuðli til at taka avgerðir sjálvi.*
>
> *At savna inn hagtøl um verjumál hjá fólki, ið bera brek, greinað eftir etniskum uppruna, kyni, aldri, breki og øðrum viðkomandi viðurskiftum.*
>
> *At beina burtur øll sløg av verandi skipanum, sum taka avgerðir fyri annan, og seta í verk skipanir, ið stuðla øðrum at taka avgerðir sjálvi, sum virða viljan og ynskini hjá fólki, ið bera brek, í øllum lívsviðurskiftum.*

[19] Serligu viðmerkingarnar í uppskotinum til grein 9, 3. og 4. reglubrot.
[20] Committee on the Rights of Persons with Disabilities. General comment No. 1 (Article 12: Equal recognition before the law). Sí stykki 1 í skjali CRPD/C/GC/1; Avgerðir kunnu verða tiknar innan nærum øll øki, og hetta tilmælið er tí ikki avmarkað einans at fevna um avgerðir um sterilisering.
[21] Sí keldu 19, stykki 44 a-d.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

Mælt verður somuleiðis til at menna eina heildarætlan fyri at seta í verk skipanir tvørtur um landsfyrisiting og kommunala fyrisiting, ið stuðla øðrum í at taka avgerðir sjálvi við hóskandi og rímiligari vernd.

Orsaka av at tvingað sterilisatión í stóran mun kann sammetast við tortur er umráðandi at vísa á, at mong dømi eru kring heimin um, at tvingað sterilisatión hevur verið nýtt sum skipanaðarligt amboð at týna fólk við breki og børn teirra, og hevur hetta elvt til píning (tortur).[22] Sum liður í altjóða skyldunum hjá londum at seta forboð móti píning (torturi), er forboð eisini sett móti tvingaðari sterilisatión. Hetta sæst í fleiri altjóða sáttmálum,[23] her undir:

- Grein 15 í Breksáttmálanum um *frælsi frá píning ella miskunnarleysari, ómenniskjaligari ella niðrandi viðferð ella revsing*, sum eisini fevnir um forboð móti tvingaðari sterilisatión.[24]
- Evropeiski mannarættindadómstólurin staðfesti í úrskurði[25] viðvíkjandi grein 3 í evropeiska mannarættindasáttmálanum, at *forboðið móti torturi* eisini kann fevna um verjumál, har ein verji, á lógligan hátt, tekur avgerð um sterilisatión *fyri* eina kvinnu, ið bera brek, ímóti hennara fría vilja. Evropeiski mannarættindasáttmálin er galdandi sum vanlig løgtingslóg, [26] og tí er hendan rættarstøða eisini er galdandi í Føroyum. Sum meginregla eigur ein nýggj løgtingslóg, eitt nú sterilisatiónslógin, hvørki at stríða aðra løgtingslóg ella við altjóða skyldur.
- Sáttmálin móti píning og aðrari ræðuligari, ómenniskjasligari ella mannminkandi viðgerð ella revsing varð samtyktur av ST aðalfundinum 10. desember í 1984, og hevur verið í gildi fyri Føroyar síðani 27. mai 1987.[27]
- Tvingað sterilisatión á fólk, ið bera brek, undir 18 ár, er greitt brot á sáttmálan um rættindi hjá børnum (barnarættindasáttmálan), sum varð samtyktur av ST aðalfundinum 20. novembur í 1989, og hevur verið í gildi fyri Føroyar síðani landafrøðiliga fyrivarni var tikið aftur tann 7. oktobur 1993.[28]

---

[22] Sí t.d. Alexandra Minna Stern 'Sterilized in the Name of Public Health Race, Immigration, and Reproductive Control in Modern California' (2005) *95* American Journal of Public Health 1128– 38, 1129.
[23] Juan E Mendez, 'Report of the Special Rapporteur on Torture' UN Doc A/ HRC/ 22/ 53 (1 February 2013).
[24] Sí t.d. CRPD Committee, 'Concluding Observations on the Initial Report of Spain' UN Doc CRPD/ C/ ESP/ CO/ 1 (19 October 2011). Greinar 37 og 38.
[25] Sí úrskurð, App No 18968/ 07, ECtHR judgment (8 November 2011). (https://hudoc.echr.coe.int/eng#{%22itemid%22:[%22001-107364%22]})
[26] Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om Den Europæiske Menneskerettighedskonvention
[27] UN Committee against torture (CAT Committee), Concluding observations: Slovakia, para 14, U.N. Doc. CAT/C/SVK/CO/2(2009); Czech Republic, stykki 6(n), U.N. Doc.CAT/C/CR/32/2
[28] CRC Comittee, General Comment No 9 (2006): The rights of children with disabilities, UN Doc CRC/ C/ GC/ 9 (27 February 2007) stykki 60;

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

Sambært Stýrisskipanarlógini,[29] grein 55, hevur løgtingslóg ikki gildi, um hon gongur ímóti millumtjóðasáttmála.

1. **Tilmæli:** Mælt verður frá at Løgtingið samtykkir uppskotið í verandi líki, áðrenn viðkomandi tilmæli frá altjóða brekrættindanevndini eru framd í verki, serliga við at menna viðkomandi lógir og kunngerðir,[30] førleikar, skipanir og hagtøl, soleiðis at fólk við breki fáa tryggjað rættarførið og harvið sjálvi, við hóskandi stuðli, kunnu taka avgerðir um eitt nú sterilisering. Lógin eigur sum meginregla ikki at fremja mismun vegna brek, her undir við ótíðarhóskandi orðum og hugtøkum (sí tilmæli undir *Ættarrøkt er mismunur vegna brek*).

2. **Tilmæli:** Helst eru fyrimunir við at byggja uppskotið á danskar ásetingar, men hetta eigur at verða gjørt við tí fyrivarni, at danska heilsutrygdarlógin, *Sundhedsloven*,[31] tekur støði í einum øðrvísi samfelagsligum og løgfrøðiligum høpi, við m.a. munandi meiri umsitingarligari orku, skipaðum rættindaeftirliti, hagtølum og einum øðrum almennum kjaki. Rættindi og lóggáva, ið viðvíkja fólki, ið bera brek, sum búgva í Føroyum, eiga at vera grundað á føroysk viðurskifti, áskoðanir og, sum heild, lógarverkið í Føroyum. Atlit eiga at verða tikin til hetta í fyrireikunum, eitt nú í mun til at lýsa evnið alment, bæði fakliga og við kjaki. Hetta hevði betrað um almennu vitanina, grundarlagið og legitimitetin í ætlanunum og endamálinum við hesum uppskoti.

Ættarrøkt er mismunur vegna brek

Uppskotið nevnir millum annað hugtøk sum *sálarliga støðu*, *sjúku* ella *órógv*, *vikna sinnisligt virkisføri, ættarbregði*, *menningartarn, veikari gávuføri*, *grov lyndisfrávik*, *álvarslig likamlig sjúka*, bæði hjá vaksnum umsøkjarum og hjá møguligum børnum, sum orsøkir, sum kunnu geva loyvi til sterilisering.

Nevndu hugtøk, og førleikar hjá bæði vaksnum fólki og børnum, eru frá náttúrunnar hond skiftandi frá einstaklingi til einstakling, og í mun til sosialu og praktisku umstøðurnar, sum eisini kunnu vera skiftandi. Hendan meting um mentalar/sálarligar ella vitbornar førleikar til at taka avgerðir, eins og øll háttaløg at meta um júst hesar førleikar, eru sera ógreið og byggja ikki á gransking ella vísund. Hetta kann sostatt vera villeiðandi, tá avgerð um sterilisering verður tikin,[32] og elvir hetta við stórari vissu til mismun vegna brek.

[29] Løgtingslóg nr. 103 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan Føroya, sum broytt við løgtingslóg nr. 75 frá 25. mai 2009
[30] Viðkomandi lógir eru m.a. almannalógin, heilsutryggdarlógin og verjumálslógin.
[31] *Sundhedsloven*. LBK nr 1011 af 17/06/2023. Sí kapitul VII.
[32] CRPD Committee, General Comment No. 1, para. 13; og World Health Organisation (WTO), "Legal Capacity and the Right to Decide Course Guide – WHO QualityRights Core training: mental health and social services", https://iris.who.int/bitstream/handle/10665/329539/9789241516716-eng.pdf?sequence=1&isAllowed=y

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

Lógaruppskotið nýtir onga allýsing av hugtakinum *brek*, sum sambært breksáttmálanum m.a. eisini fevnir um hugtøk *sjúku*, og onnur líknandi hugtøk, sum hava grundleggjandi týdning fyri bæði umsøkjarar, og borgarar, ið ikki velja at søkja.

Lógaruppskotið eigur tí at fáa innført allýsingina úr altjóða brekrættindasáttmálanum, ið byggir á framkomna serkøna vitan og semju millum heimsins lond. Allýsingin úr altjóða brekrættindasáttmálanum er hendan:

> *Fólk, ið bera brek, fevna um tey, sum hava varandi likamlig, sálarlig, vitborin og kenslulig mein, sum í samvirki við ymsar forðingar kunnu forða fyri, at tey til fulnar og á virknan hátt kunnu vera við í samfelagnum á jøvunum føti við onnur.*[33]

Eisini er viðkomandi at lýsa hugtakið *mismunur grundaður á brek*:

> *at skilja sum ein og hvør munur, útihýsing ella avmarking, grundað á brek, sum hevur til endamáls ella sum ávirkan at skaða ella gera til einkis, at fólk við breki javnbjóðis øðrum kunnu viðurkenna, njóta og nýta øll mannarættindi og grundleggandi politisk, búskaparlig, sosial, mentanarlig, borgarlig ella onnur frælsi. Tað fevnir um allan mismun, eisini at fáa noktað rímiligar tillagingar.*[34]

Altjóða brekrættindanevndin hevur útgreinað, at *mismunur* móti fólki, ið bera brek, eigur at verða greinað og tulkað, bæði sum *beinleiðis* og *óbeinleiðis* mismunur vegna brek.[35] Eisini verður víst á, at altjóða brekrættindanevndin hevur staðfest í viðmerking til sjálvan sáttmálan, at lond hava skyldu at virða, verja og fremja javnrættindi hjá øllum fólkum, ið bera brek, og at verja tey móti mismuni. Lond hava tískil skyldu at ikki taka nøkur stig, ið fremja mismun vegna brek. Ítøkiliga merkir hetta, at londu hava skyldu at dagføra ella broyta lógir, reglugerðir, siðvenjur ella venjur, ið fremja slíkan mismun.[36]

Brekrættindasáttmálin hevur sum grundleggjandi endamál at forða fyri at lógir, ið viðvíkja fólki, ið bera brek, framhaldandi byggja á heilivágshugsan og olmussu, og at lógir heldur verða mentar sambært mannarættindatilgongdini (*Human Rights Approach*).

Best hevði verið at skrivað inn í endamálsorðingina í uppskotinum, sí brot 1.3 í viðmerkingunum, at nýggja steriliseringslógin, í mun til galdandi lóg frá 1967, sum heild, ikki skal fremja mismun eitt nú vegna brek, kyn o.a..

---

[33] Brekrættindasáttmálin. Grein 2, stykki 1.
[34] Brekrættindasáttmálin. Grein 2, stykki 2.
[35] Committee on the Rights of Persons with Disabilities. General Comment on Equality and Non- discrimination (Article 5). CRPD/C/GC/6. Stykki 20 (a) og (b).
[36] Committee on the Rights of Persons with Disabilities. General Comment on Equality and Non- discrimination (Article 5). CRPD/C/GC/6.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

Samstundis áttu nevndu heilivágskend hugtøk (t.d. sálarliga sjúka o.l.) at verða strikað úr lógartekstinum, og viðmerkingarnar áttu at lýst viðkomandi avbjóðingar, soleiðis at nýggja steriliseringslógin ikki eisini verður ein mismunarlóg.

Viðvíkjandi grein 4, stykki 1, í uppskotinum, verður víst á, at barnarættindanevndin hjá ST hevur staðfest viðvíkjandi grein 3 í altjóða barnarættindasáttmálanum um *barsins besta*, at í øllum málum, ið viðvíkja børnum, eigur *barsins tørvur* at vera tað atlitið, ið verður vigað fyrst og fremst í mun til onnur atlit. Hendan staðfesting vendir sær ítøkiliga til lóggeva og aðrar myndugleikar, sum hava fingið ábyrgd og álit at gera lógarverk, ið skal verja rættindi hjá børnum, ið bera brek. Heilt grundleggjandi fyri hugtakið *barnsins besta* er, at um nakar ivi viðvíkjandi viðurskiftum, sum kunnu fremja mismun, fordómar ella skaða móti børnum, so eigur hesin ivi at koma barninum til góðar. Eru sostatt nøkur atlit, ið kunnu sáa iva um støðuna hjá barninum, ið eitt nú kann leiða til, at barnið fær lív lagað, ella ikki, orsaka av einum breki, so hevur MEGD ta fatan, at ivin eigur at verða tulkaður á slíkan hátt, at hann til barnsins besta.

Bæði læknaliga og sosial/samfelagsliga er ómetaliga trupult, og ofta ógjørligt, at meta um, hvørt mamma ella barn fáa mein, *sum í samvirki við ymsar forðingar í samfelagnum kunnu forða fyri, at tey til fulnar og á virknan hátt kunnu vera við í samfelagnum á jøvunum føti við onnur*.

Tað eru eisini grundleggjandi avbjóðingar við at stigbenda hugtakið brek, og harvið meta um, nær eitt brek er *álvarsligt* ella ikki, og grundleggjandi avbjóðingar standast eisini við at stigbenda hugtakið *umsorgan*. Harvið ber ikki til at meta um við vissu, nær ein mamma ikki fær havt umsorgan fyri barninum á fullgóðan hátt, serliga um hetta er í samvirki við samfelagið, ella møguligar forðingar ella møguleikar í samfelagnum.

Orðingarnar í tekstinum leggja upp til, og kunnu við tíðini mana fram ein hugburð ella mentan, ið tekur fyri givið, at eitt lív við breki, er minni vert at liva, og at fólk við breki eru í minni mun menniskju, enn onnur, ið ikki bera brek. Brekrættindanevndin hjá ST hevur ávarað ímóti at lóggáva bæði beinleiðis og óbeinleiðis fremur mismun eitt nú orsaka av innihaldi, orðingum ella diskursi.[37]

Somu atlit, sum áður eru nevnd, eru galdandi í sambandi við mismun móti kvinnuni, ið ber brek. Tað er einans í samvirki við ymsar forðingar í samfelagnum, ið kunnu forða fyri, at fólk ikki kunnu vera við í samfelagnum á jøvunum føti við onnur, at vit tala um eitt brek. Harav hevur tað alstóran týdning, at rættindi hjá kvinnum, ið bera brek, verða framd í verki, við góðum og væl gjørdum samfelagssligum skipanum, og at kvinna, ið ber brek, í sambandi við sterilisatión, verður væl kunnað um rættindi hennara og rættindini hjá barninum, um tað verður føtt, eitt nú til sosialar, heilsutrygdarligar ella fíggjarligar tillagingar, eitt nú til tillagað starv.

[37] Committee on the Rights of Persons with Disabilities. General Comment on Equality and Non- discrimination (Grein 5). CRPD/C/GC/6.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo

Atlit eiga at verða tikin til at tillaga samskifti um hesi viðurskifti, eitt nú við løttum máli, teknmálstulking og at samrøður vera hildnar undir góðum og tryggum umstøðum.

Søgan hevur lært okkum, at rættindi hjá ávísum samfelagbólkum og minnilutum hava verið skerd. Orsøkirnar hava verið mangar, eitt nú vegna húðarlit, kyn, tjóðskap, átrúnað og brek. Kjarnin í mannarættindum er millum annað tí, at øll hava náttúrliga og ómissandi íborna tign og virðing. *Rætturin til lív* varð upprunliga tískil tikin við í altjóða brekrættindasáttmálan, grein 10, nevniliga fyri at staðfesta greitt, at fólk, við breki, nevniliga hava rætt til somu virðing og rættindi, og onnur, ið ikki bera brek, og harvið verður forðað fyri fordómum, hugburði og fatanum, um eitt nú at lívið hjá fólki, ið bera brek, ikki er virðiligt og ikki vert at liva.[38]

Sambært altjóða mannarættindalóg er *rætturin til lív* hin mest týðandi, og einki frávik ella undantak eigur undir nøkrum umstøðum at vera givið til tess at skerja hendan rætt, sjálvt ikki í kreppustøðum, ið hótta bæði land og fólk. Mannarættindanevndin hjá ST hevur útgreinað, at hóast royndir vísa, at vandi er fyri at tulka rættin til lív á avmarkandi hátt, so eigur rætturin til lív tó ongantíð at vera tulkaður avmarkandi ella smalt.[39]

3. **Tilmæli:** Nýggja steriliseringslógin, eigur ikki at verða ein mismunarlóg, ið - eins og hin gamla frá 1967, sum nú er galdandi – lættliga fer at geva atgongd til brek-grundaðar steriliseringar, og hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis fer at trýsta nakran, orsaka av teirra breki, hvørki til ella frá sterilisering. Rættindi hjá børnum, ið bera brek, eiga eisini at verða framd í verki, og neyðug atlit eiga at verða tikin til vítt fevnandi altjóða skyldur Føroya at seta forboð móti píning. Hugtøk og ásetingar (t.d. sálarliga sjúka o.l.), ið taka støði í gamlari heilivágs- og olmussuhugsan, eiga samstundis at verða strikað. Nýggja lógin eigur í nøktandi mun at byggja á altjóða brekrættindasáttmálan, og aðrar viðkomandi altjóða sáttmálar, og á viðkomandi tilmæli frá brekrættindanevndini hjá ST.

Vinaliga vegna MEGD,

Ruth Thomsen
Forkvinna

Bárður Atlason Ísheim
aðalskrivari

[38] Ilias Bantekas, Michael Ashley Stein, Dimitris Anastasiou (ed.). 2018. *The UN Convention on the Rights of Persons with Disabilities: A Commentary*. Oxford University Press. Síða 288.
[39] CCPR General Comment No. 6: Article 6 (*Right to Life*). Adopted at the Sixteenth Session of the Human Rights Committee, on 30 April 1982. CCPR/C/GC/36.

MEGD
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo